Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 23. september 2005

COUNTRY DANSUR

Tann árligi Country Dansurin verður í ítróttarhøllini á Hálsi 24. september frá kl. 22

Bólkarnir ið spæla: Country Orkestrið
Twilight
Countrybólkurin úr Klaksvík

Forsølan av atgongumerkjum kring landið er byrja

STUÐLAFELAGIÐ HJÁ ARGJA BÓLTFELAG





**Tematýsdagur: Design til fólkið**

Fokus verður sett á IKEA og spurt verður um, hví tað eydnaðist teimum so væl at selja dygdargott design til fólkið. Sendingarnar í kvøld fevna m.a. um eina vangamynd av stovnaranum av IKEA, Ingvar Kamprad. Hann var einans 17 ár, tá hann í 1943 stovnaði postsøluvirkið, ið seinni bleiv til IKEA.

**Týsdag 27. kl. 19.30**

**Mentanarvirðisløn krúnprinsaparsins**

Fredrik krúnprinsur skal handa mentanarvirðislønina á 500.000 kr. til eitt danskt listafólk. Handanin fer fram á stóra pallinum í nýggja operahúsinum í Keypmannahavn. Men forkunnugur tónleikur er eisini á skránni. Danski bólkurin Swan Lee leggur fyri, og hin avstralski Nick Cave kemur aftaná. DR hevur fingið loyvi at senda ein part av konsertini.

**Sunnudag 25. kl. 18.00**

**Hard Rain**

Hin ungi Tom situr við róðri í einum transportbili, ið hevur ein dýran førning við sær - nevniliga tríggjar milliónir dollarar. Undir liðini á sær hevur Tom gubba sín Charlie. Ógvusligt regn og áarføri forðar teimum báðum í at føra pengarnar fram til móttakaran. Harumframt liggja brotsmenn uppá lúr. Aktión við Morgan Freeman og Christian Slater.

**Mánadag 26. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**